gult22 cyan22 magenta22 svart22



GÍ-B68 2-0 (0-0):

# GÍ hevur fulla ferð á ketlunum

**Undirhaldið var gott, tá gøtumenn tryggjaðu sær toppplássið, tá kappingin verður hálvrunnin, og toftamenn vístu leingi góðan hugburð**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



*Fyri fyrstu ferð skoraði Helgi ikki, men rituvíkingurin var kortini við í uppspælinum til bæði GÍ málini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var sum at vera miðskeiðis í níti árunum í Sarpigerði mikukvøldið. Fólkið kring vøllin var nógv, undirhaldið var gott, GÍ vann, teir hava framvegis fult stigatal, og tí segði tað seg sjálvt, at tað ljóðaði av ovfarakæti, tá stadion speakarin, Jørgin Evald Solmunde, eftir dystin bjóðaði øllum at vera vælkomnum í ítróttarhúsið at fáa sær ein drekkamunn við køkubita afturvið.

Gamli GÍ formaðurin, Haldgrím Gregersen, sparkaði fyrsta sparkið á nýggja undirlagnum, og so vóru nógvu áskoðararnir vitni til ein tíma, har tað reið um snarið, og har undirhaldsvirðið var høgt, tí tað gekk skjótt báðar vegir, og tað vóru fleiri málmøguleikar.

## Munurin

GÍ vann 2–0, men tað var ikki fyrr enn miðskeiðis í 2. hálvleiki, at teir fingu hol á. Óli Hansen skoraði til 1–0 í 63. minutti, og Henning Jarnskor staðfesti áttanda gøtusigurin í landskappingini á rað, tá tað restaði eitt stórt korter.

Eftir málini var eingin ivi um, at GÍ fór at vinna. Spurningurin var heldur, hvussu stórur sigurin fór at verða.

Talan var leingi um tætta uppgerð, men sum so mangan áður, so endaði tað við GÍ sigri, og gongdin vísti, at tað var ikki so undarligt. GÍ vísti mikukvøldið, at teir hava eitt stak væl skipað kollektiv, har størsta styrkin er, at teir so at siga ikki gera mistøk í verjupartinum.

B68 stóð seg leingi væl, men tað kostaði teimum í dýrar dómar, at teir nakrar ferðir mistóku seg stórliga.

Longu í 1. hálvleiki lótu teir toppskjúttan í bestu deildini, Helga L. Petersen, standa púra óansaðan, tá GÍ fyri fyrstu ferð hevði hornaspark. Helgi stútaði ímóti málinum, men bólturin fór dygst framvið. Tá GÍ fekk hol á, endurtóku toftamenn mistakið. Helgi L. Petersen var púra leysur, tá hann stútaði hornasparksinnlegg úr høgru ímóti málinum, og Óli Hansen kastaði seg fram og trýsti bóltin inn um strikuna.

Í 74. minutti økti GÍ. Aftur var talan um deyðbóltsstøðu, og aftur sektaði GÍ persónligt mistak. Langt innkast úr høgru varð longt inn í málteigin. Ein av B68 verjumonnunum royndi at sparka burtur, men ólukkutíð fyri teir reyðu, so kom bólturin fyri føturnar á Henningi Jarnskor. Úr fimtan metum og mitt fyri sendi hann í nettakið, og so var liðugt.

## B68 góðan hugburð

Toftamenn vóru væl nøgdir við avrikið leygardagin í Lokeren í Belgia, og teir royndu at bera positiva hugburðin og góða stríðsviljan frá tí dystinum víðari. Jan Petersen var sera avgjørdur á aftasta manni, og teir tríggir á sentrala miðvøllinum vóru eydsýndir.

Landsliðsmenninir Øssur Hansen og Fróði Benjaminsen duga nógv við bóltinum, og teir arbeiddu væl. Merkisvert var tað, at ungi Jann Ingi Petersen, sum hevði verjukenda miðvallarleiklutin, stóð so sterkur í myndini. Hann hevði ofta bóltin, og hann var sera skilagóður.

Toftamenn vóru mesta partin av fyrra umfarinum leikliga omaná, men teir megnaðu ikki at fáa mál. Fróði Benjaminsen stakk beinanvegin Marcello leysan, men hann sendi framvið Halli Hansen, sum var komin fram úr málinum. Hetta var størsti møguleikin hjá B68. Teir høvdu onkran annan eitt sindur meiri enn hálvgóðan møguleika, og í 2. hálvleiki var Súni Fríði Johannesen tætt við eftir best spælda B68 álopið og innlegg úr høgru og til nærra stólpan, men sum heild vóru toftamenn ikki serliga vandamiklir á álopsspælinum. Súni Fríði fekk lítið at arbeiða við, Marcello er langt frá støðinum í fjør, og tað gongur sjálvandi út yvir álopsspælararnar, at tyngdin í borðunum tykist vera so lítil.



*Toppskjúttin frá í fjør, Súni Fríði Johannesen, hevur ikki havt somu ferð á í ár, men stuðulin frá liðfeløgunum hevur heldur ikki verið hin sami*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Gøtumenn eru drúgvir

Tað var týðuligt, at GÍ á sentrala miðvøllinum ikki hevði somu styrki sum gestirnir, og tí er tað ikki minni merkisvert, at teir kortini megnaðu at vinna.

GÍ saknaði skadda Sámal Joensen, og Magni Jarnskor, sum varð sproytaður undan dystinum, fekk ikki altíð so nógvan stuðul, men gøtumenn hava nógvar styrkir, sum eru partar av frágreiðingini upp á, at teir eru so væl fyri. Hallur Hansen er ein fínur málverji. Leivur Hansen, Bartal Eliassen og Poul Ennigarð eru sera stinnir og tryggir í miðverjuni, og í vinstra borði nýtir Henning Jarnskor allar sínar royndir og spælir betri, enn hann hevur gjørt leingi.

Fyri fyrstu ferð í ár fór Helgi L. Petersen av vøllinum uttan at hava skorað í landskappingardysti. Men Helgi vísti ferð eftir ferð, hví hann í løtuni verður roknaður sum besti álopsmaðurin í landinum. Jákup Eli Olsen og Hans Fróði Hansen, ið ikki tykist vera so væl fyri, sum landsliðsmiðverjin hevur verið í undanfarnu árini, høvdu ofta stórar trupulleikar at halda Helga. Og hóast Helgi ikki skoraði hesa ferð, so var hann við í uppspælinum til bæði málini.

Hans Fróði gav beinanvegin Helga L. Petersen ein risa møguleika, sum toppskjúttin misnýtti, og í 2. hálvleiki var GÍ fleiri ferðir tætt við m. a. í støðum eftir hornaspørk.

GÍ hevur nú vunnið átta ferðir upp í slag. Um teir halda fram við sama hugburði og álvara, sum teir hava sýnt higartil, so er rættuliga stórur møguleiki fyri, at teir fara at vinna fleiri sigrar afturat, áðrenn teir kanska fara at missa stig.

B68 er fjórði aftast, og tað er heilt langt fram til Europa Cup plássini. Men um hugburðurin frá fyrsta tímanum í Gøtu verður fremstur komandi vikurnar, so áttu møguleikar at verið fyri fleiri stigum.

**GÍ–B68 2–0 (0–0)**
1–0: Óli Hansen 63.
2–0: Henning Jarnskor 74.

**GÍ:** Hallur Hansen – Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen – Poul Henning Jacobsen, Áslakur R. Petersen, Magni Jarnskor, Zdzislaw Janik, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen, Óli Hansen
**B68:** Magnus Poulsen – Hans Fróði Hansen, Jan Petersen, Jákup Eli Olsen (Messias Perreira, 78.) – Arnold Joensen, Fróði Benjaminsen, Jann Ingi Petersen, Øssur Hansen, John Heri Dam – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino (Marlon Jorge, 78.)

gult23 cyan23 magenta23 svart23



KÍ-ÍF 7-2 (2-2):

# Hjalgrím søkti fuglfirðingar

**KÍ og Hjalgrím Elttør vunnu ein sannførandi sigur í finaluni um Thomas Dam steypið, men fuglfirðingar kunnu bert takka sær sjálvum fyri, at úrslitið ikki gjørdist eitt heilt annað**

STEYPAFINALA
*Jákup Mørk*



*Klaksvíkingar eru steypavinnarar í unglingadeildini 2001*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mikukvøldið var Tórsvøllur vertur fyri steypafinaluni hjá unglingum. Kappingini um sonevnda Thomas Dam steypið. Luttakararnir vóru KÍ og ÍF, sum høvdu leikt seg fram til finaludystin við sigrum á ávíkavist HB og NSÍ.

Spældu fyri møguleikanum

Kanska var luttøkan hjá ÍF eitt sindur óvæntað, tí tá hálvfinalurnar vóru á skránni mundu flestu rokna við, at runavíkingar vóru favorittarnir í hesari, eins og klaksvíkingar framman undan hesum dystinum vórðu mettir sum favorittar.

Tað gjørdist tó skjótt greitt, at fuglfirðingarnir so avgjørt ikki vóru komnir til Havnar við einum møguligum tapi í huga. Byrjan teirra var bragdlig, og hóast KÍ royndi at muta ímóti, so var spælið alt fyri eitt trýst oman móti KÍ málinum. Serstakliga lá væl fyri hjá ÍF at gera sær dælt av vengrunum, sum ferð eftir ferð komu fram við til tíðir illa skipaðu KÍ verjuni, fyri síðani at senda bóltar inn fyri málið.

Onkrar vandastøður stóðust eisini av hesum, og tað vóru eisini fuglfirðingar, sum áttu fyrsta stóra møguleikan, men úr stuttari fjarstøðu sendi Høgni Madsen bóltin upp um. KÍ hevði fram til tá at kalla bert roynt seg við longum bóltum til framherjarnar, og í næsta álopinum gav hetta eisini bonus. Hjalgrím Elttør varð sendir avstað, og eftir at hava sneitt verjuleikara av, sendi hann framvið málverjanum til Gunnleif Biskupstøð, sum hevði at kalla opið mál.

Løtu seinni endaði eitt at kalla identiskt KÍ álop við, at Hjalgrím enn einaferð gjørdist leysur í vinstru. Hesa ferð skeyt hann sjálvur, so samstundis sum fuglfirðingar høvdu sýnt seg at vera spælstýrandi, vóru teir nú aftan fyri við tveimum málum.

## Komu aftur

Skelkurin fekk tó á ongan hátt fuglfirðingar at fella í fátt. Heldur treiskaðust teir, og komandi hálva tíman var álopsspælið framhaldandi málsøki, tó við tí muni, at teir nú eisini vóru meira nærlagdir í verjupartinum.

Bólturin ferðaðist at kalla konstant uppi á KÍ hálvuni, og fleiri meira ella minni vandamiklir møguleikar spurdust eisini burtur úr. Atli Petersen var leysur, men Karstin Joensen í KÍ-málinum bjargaði frágera væl, men løtu seinni var Karstin heldur óansin.

Ein bóltur varð sendir inn í KÍ brotstegin, og bæði Karstin og Høgni Madsen eltu bóltin, og tá Karstin tveitti seg, tók hann samstundis beinini undan Høgna. Brotssparkið skeyt Høgni Zachariassen flatt til vinstru, og nú kom av álvara ferð á ÍF.

Møguleikarnir trutu ikki, men líkt var til, at líka mikið hvussu teir royndu, so rendu teir seg alla tíðina í livandi múrin í KÍ málinum, og ikki fyrr enn teir fingu enn eitt brotsspark, eydnaðist at koma upp á javnt. Hesa ferð var tað Atli Petersen, sum eftir eina snilda fintu í brotsteiginum, og aftur varð Høgni settur at skjóta. Hesa ferð skeyt hann høgt og til høgru, men úrslitið var hitt sama og so var javnt.

Restina av hálvleikinum høvdu fuglfirðingar fleiri møguleikar. Millum annað vóru menn tvær ferðir leysir í brotsteiginum, men báðu ferðirnar bjargaði Karstin framúr væl, so javnleikur var framvegis støðan, tá farið varð til hálvleiks.

## KÍ hamskiftir

Mett eftir fyrra hálvleiki, so tóktist tað bert vera ein spurningur um tíð, áðrenn fuglfirðingar avgjørdu dystin, men so skuldi tó ikki verða.

Klaksvíkingar høvdu nýtt steðgin til at umskipa miðvøllin nakað, men størsta týdningin hevði tað helst, at eisini hugburður teirra var fullkomuliga umskipaður.

Kropsliga tóktust teir at vera væl betri fyri enn mótstøðumenninir, og nú varð hetta nýtt til at seta seg fullkomuliga á miðvøllin. Tað gingu heldur ikki meira enn sjey minuttir, so hevði KÍ endurstovnað tvey mála leiðsluna, og aftur var tað Hjalgrím Elttør, sum gjørdi um seg.

Fyrst dróg hann seg leysan í vinstru, áðrenn hann sendi fram við málverjanum, og tá misskiljing í ÍF verjuni løtu seinni gav honum møguleikan, dróg hann framvið málverjanum, áðrenn bólturin varð rullaður inn.

Fuglfirðingar tóktust nú av álvara lamslignir. Orkan til at vinna seg aftur enn einaferð var ikki til staðar, og so kundu KÍ og serstakliga Hjalgrím av álvara fara í gongd.

Málið til 5-2 var ein sonn perla. Staddur beint uttan fyri brotsteigin fekk Hjalgrím eina sending, og eftir at hava sett fyrsta mannin av, bankaði hann bóltin í mótsatta málhorn.

Var hetta ein perla, var fimta KÍ-málið og fjórða Hjalgrím-málið tað ikki minni. Púra leysur við málverjanum var hann ísakaldur, og heldur enn at smekka til, kipti hann bóltin, sum í bleytum boga legði seg til rættist í meskunum.

## Uppiborið og tó

Seinasta korterið var sostatt bert ein spurningur um at fáa tíðna at ganga, og tá Martin Rúni Joensen í seinasta minuttinum staðfesti, var sigurin longu ein sannroynd.

Mett eftir seinna hálvleiki, var tað eisini fult uppiborið, at KÍ vann dystin. Teir vóru tá við yvirlutan í flestum pørtum. Miðvøllurin riggaði væl, og so høvdu teir Hjalgrím Elttør í álopinum. Ein leikari, sum vit uttan iva fara at hoyra og síggja nógv til framyvir.

Tað skerst tó ikki burtur, at fuglfirðingarnir mundu iðra seg eftir dystin. Høvdu teir kent sína vitjunartíð, kundi støðan lættliga verið bæði 4- og 5-2 áðrenn hálvleikssteðgin, og tá vildi spurningurin verið, um KÍ kundi reist seg.

Alt hetta verða tó ikki til meira enn hypotetiskir spurningar. Framyvir fara søgubøkurnar at siga, at KÍ vann ein greiðan sigur í finaluni 2001, og eftir er bert at ynskja teimum hjartaliga tillukku við sigrinum.

KÍ-ÍF 7-2 (2-2)
1-0: Gunleif Biskupstøð 12.
2-0: Hjalgrím Elttør 14.
2-1: Høgni J. Zachariassen (br.) 20.
2-2: Høgni J. Zachariassen (br.) 33.
3-2: Hjalgrím Elttør 51.
4-2: Hjalgrím Elttør 53.
5-2: Hjalgrím Elttør 63.
6-2: Hjalgrím Elttør 77.
7-2: Martin Rúni Joensen 90.

Dómari: Birgir Sondum



*Hjalgrím Elttør skýtur her sítt næsta mál, og so eru klaksvíkingar aftur á odda. Tá avtornaði hevði Hjalgrím skotið fimm av KÍ málunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Ein av fyrstu uppgávunum hjá fótbóltsáhugaða landsstýrismanninum var at handa KÍ-unglingunum Thomas Dam steypið*